Vatnskutaraferðin til Danmarkar:

# Ábyrgdarleyst!

**Teir báðir Atli S. Petersen og Sveinur Høgnason, sum ætla sær til Danmarkar á vatnskutara, voldu mikið stríð, tá alt samband hvarv hósdagin á veg til Hetlands. Leiðarin á MRCC-bjargingarstøðini, Djóni Weihe, heldur talan vera um ábyrgdarleysan atburð og mælir til størri umhugsni**

SJÓFERÐSLA
*Heini í Skorini*



*Tá alt samband hvarv við Atla S. Petersen og Sveinur Høgnason á vatnskutarunum hósdagin, varð stór fyrireiking til bjargingararbeiði sett í verk. - Talan er um ábyrgdarleysan atburð, sigur Djóni Weihe, leiðari á MRCC-bjargingarstøðini*

Í gjár komu Sveinur Høgnason og Atli S. Petersen til Hetlands á vatnskutarum sínum, tá klokkan var umleið hálvgum sjey. Men alt gekk eftir øllum at døma ikki eftir ætlan, tí teir løgdu nevniliga at landi í Hetlandi góðar sjey tímar seinni, enn teir upprunaliga ætlaðu.

Umframt hetta mistu avvarðandi alt samband við teir báðar um hálvgum seks, og tískil setti MRCC-bjargingarstøðin í Føroyum stór fyrireikingartiltøk í verk.

- Vit komu í eina óttastøðu og máttu tí fyrireika okkum til bjargingartiltøk, sigur Djóni Weihe, leiðari á MRCC-bjargingarstøðini í Havn.

### Fyrireikaðu alt

MRCC-støðin setti seg í samband við Shetland Coast Guard, sum sendi boð til allar bátar og skip har um leiðir at hava vakin eygu, og samband var eisini við oljuplatform, sum skuldi hava trý hjálparskip tøk.

Umframt hetta vóru føroysku og hetlendsku bjargingartyrlurnar til reiðar til fráferð, og sostatt kann ikki sigast annað, enn at øll orka varð løgd í fyrireikingarnar at bjarga teimum báðum føroyingunum, um hetta skuldi verið neyðugt.

Men klokkan 18.24 varð staðfest, at teir vóru komnir til Hetlands, sjey tímar seinni enn ætlað. John Vilhelmsen boðaði frá hesum, og skuldi hann verið triði maðurin á aldunum til Hetlands, men við tað at vatnskutari hansara hevur fingið skaða, mátti hann vera eftir í Føroyum.

### - Ikki havt samband við nakran

Leiðarin á MRCC-bjargingarstøðini, Djóni Weihe, vísir á, at talan er um ábyrgdarleysan atburð.

- Teir hava ikki havt samband við okkum áðrenn teir fóru, og tað er avgjørt neyðugt, tá talan er um slíkt vágaverk. Teir hava ikki verið nóg mikið at sær komnir, tí teir voldu jú mikið høvuðbrýggj hósdagin, tá eitt heilt maskinaríð varð sett í gongd vegna vantandi sambandi, sigur Djóni Weihe.

Hann vísir víðari á, at hann ikki ynskir at oyðileggja nakað fyri æventýrararnar á vatnskutarunum, men eftirlýsir heldur ábyrgdarfullari atburð, so trygdin verður í hásæti.

- Tá t.d. tyrlur eru á flog, er samband fimtanda hvønn minutt, so vitast kann, um alt gongur eftir ætlan. Men í hesum føri hevur talan als ikki verið um nakað samband ella nakra fráboðan, og tað er ábyrgdarleyst, sigur Djóni Weihe.

### Stórar útreiðslur

Tá skip, bátar, tyrlur, oljuplatformar og bjargingarmanningar fáa fráboðan um at seta bjargingartiltøk í verk, er talan sambært Djóna Weihe um stórar útreiðslur.

- Vit tosa ikki um smápening, tá skip í arbeiði fáa boð um at steðga við arbeiðnum til frama fyri tveir førarar á vatnskutarum, tí hvør tími er sjálvsagt sera kostnaðarmikil hjá slíkum skipum, sigur Djóni Weihe. Umframt hetta er talan um nógvar arbeiðstímar hjá øllum bjargingarmanningum, og er hetta eisini ein orsøk at vísa størri virðing, ábyrgd og skynsemi.

### Mæla til fráboðan og samstarv

Á NRCC-bjargingarstøðini verður harafturímóti mælt til, at fráboðanarviðurskiftini eru í ordan, tá líknandi er á skránni.

- Til frama fyri trygdina er okkara áheitan, at sagt verður frá, tá frítíðarbátar, smábátar, vatnskutarar o.s.fr. leggja frá landi, tí tað ger arbeiðið nógv léttari fyri okkum, umframt at trygdin er í ordan, slær Djóni Weihe fast. Hann eftirlýsir tættari samstarv og samskifti millum bjargingarstøðina og manningar á sjónum, og tað hevur talan eftir øllum at døma ikki verið um í hesum føri.

- Tað er ábyrgd okkara at vera til reiðar, tá okkurt er áfatt, líkamikið um talan er um óamannaverk ella ikki, og tískil hevði verið ynskiligt, um fólk høvdu hugsað seg betri um og boða frá, tá ætlanir sum hesar eru á skránni, sigur ein avgjørdur Djóni Weihe.

Hvussu er og ikki, so settu Atli S. Petersen og Sveinur Høgnason alla MRCC manningina í fyrireikingarstøðu, meðan stórur partur av skipaflotanum í Norðuratlantshavi millum Føroyar og Hetland fekk boð um møguligt leitingararbeiði. Til alla lukku komu viðurskiftini í rætt lag, áðrenn hetta hendi…



*Avvarðandu fólkini høvdu alla orsøk at óttast hósdagin, tá sambandið hvarv við teir báðar á vatnskutarunum og bjargingargtiltøk vórðu fyrireikað*

*Mynd: Maria Olsen*



Fyrrverandi formaður í Føroya Arbeiðsgevarafelag:

# -Fasti gerðarrætturin skerjir ikki verkfalsrættin

**Fyrrverandi formaðurin í Føroya Arbeiðsgevarafelag, Jógvan Vágsheyg, heldur, at lóggeving fyri einum føstum gerðarrætti er rætta loysnin. Hann metir, at verkføll eru lítið uppbyggjandi fyri eitt samfelag, og tí er neyðugt, at ein fastur gerðarrættur verður niðurfestur við lóg**

FASTI GERÐARRÆTTURIN
*Páll Holm Johannesen*



*Jógvan Vágsheyg, fyrrverandi formaður í Føroya Arbeiðsgevarafelag er ikki samdur við Ingeborg Vinther í, at verkfalsrætturin verður skerdur við einum føstum gerðarrætti. Vit eiga at fylgja okkara grannalondum, og seta ein fastan gerðarrætt á stovn, heldur Jógvan Vágsheyg*

Jógvan Vágsheyg er fyrrverandi formaður í Føroya Arbeiðsgevarafelag. Hann sat sum formaður frá 1982 til miðskeiðis í 90 árunum, og hevur tí drúgvar royndir í ósemjum á arbeiðsmarknaðinum. Í tíðarskeiðnum, har hann sat sum formaður, vóru fleiri drúgv verkføll, og hann dylir ikki fyri, at ein fastur gerðarrættur ongantíð ov skjótt má setast á stovn í Føroyum.

– Hyggur tú at øllum londum rundan um okkum, so hava tey ein arbeiðsrætt( fasti gerðarrættur á føroyskum, blðm) til at loysa trætur, og eftir mínum tykki hoyrir ein slíkur rættur til í einum hvørjum modernaðum samfelagi, sigur Jógvan Vágsheyg.

Fyrrverandi formaðurin greiðir frá, at tað altíð hevur verið nógv frammi um at fáa ein fastan gerðarrætt í Føroyum. Kjakið plagar vanliga at vera í hæddini eftir, at landið hevur verið rakt av drúgvum verkfalli, men síðan dovnar kjakið.

Jógvan Vágsheyg fortelur, at í 80 árunum var eitt álit lagt fram, at seta í verk ein arbeiðsrætt, men fakfeløgini skúgvaðu álitið til viks.

### Skerjir ikki verkfalsrættin

Hann er als ikki samdur í Ingeborg Vinther, sum fyri viku síðan førdi fram, at demokratisk rættindi verða tikin frá arbeiðarafeløgunum, um ein fastur gerðarrættur verður settur á stovn í Føroyum.

– Fasti gerðarrætturin skerjir ikki nakran verkfalsrætt, tí rætturin tekur bert støður til trætur, sum eru millum partarnar, so leingi sáttmáli er. Um sáttmálaskeiðið er gingið út, kann fasti gerðarrætturin einki gera, og tá kunnu fakfeløgini leggja arbeiðið niður, um tey ynskja tað, greiðir Jógvan Vágsheyg frá.

Hóast fastur gerðarrættur verður settur á stovn, so varðveita fakfeløgini verkfalsrættin, tá sáttmálaskeiðið er lokið. Skal verkfalsrætturin skerjast, tá sáttmálaskeiðið er lokið, krevst ein høvuðsavtala millum partarnar

Á føroyska arbeiðsmarknaðinum í dag eru fáar høvuðsavtalur. Føroya Lærarafelag er eitt felag, sum hevur eina høvuðsavtalu. Í høvuðsavtaluni liggur, at felagið hevur ikki loyvi til at fara í verkfall, sjálvt um sáttmálaskeiðið er lokið.

Fyrrverandi formaðurin í Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur eisini, at tað eisini er ein røtt leið at royna at fáa allar partarnar á føroyska arbeiðsmarknaðinum at skriva undir eina høvuðsavtalu. Hann heldur, tað kundi verið til at fingið enn betri skipað viðurskifti á føroyska arbeiðsmarknaðinum.

### Lóggeving er loysnin

Jógvan Vágsheyg er saman við bæði Jan Mortensen og Bjarna Djurholm samdur í, at neyðugt er at lóggeva fyri fasta gerðarrættinum. Hann heldur, at um vit skulu hava skipað viðurskifti á føroyska arbeiðsmarknaðinum, so er neyðugt við einum rætti, ið kann taka skjótar og greiðar avgerðir.

– Í øllum okkara grannalondum hava tey ein fastan gerðarrætt, og tí skulu vit sjálvsagt eisini hava ein. Tað er einki uppbyggjandi við at hava verkføll, sum altíð kosta nógv, og tí meti eg avgjørt, at tað er neyðugt, at fasti gerðarrætturin verður niðurfestur við lóg, sigur ein avgjørdur Jógvan Vágsheyg.

Hann nevnir í sama viðfangi Danmark sum dømi. Tá, hann sat sum formaður í Føroya Arbeiðsgevarafelag, vóru tað donsku fakfeløgini, ið høvdu størst gagn av fasta gerðarrættinum, og hóast hann ikki er greiður yvir, hvussu støðan er í dag, so átti tað at verið eitt tekin til føroysku fakfeløgini um, at fasti gerðarrætturin eisini kann verða ein ágóði fyri tey.

Ellindur Egilstrøð, Gallup-Føroyar:

# -Fólk mugu sleppa at siga sína hugsan

**Hóast forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag, Ingeborg Vinther, heldur, at tað er ov lítið at spyrja 500 fólk , so tekur stjórin á Gallup-Føroyar ikki undir við henni. Vit hava haldgóð prógv fyri, at 500 fólk er nóg mikið, sigur Ellindur Egilstrøð**

SPURNARKANNING
*Páll Holm Johannesen*

Eftir spurnarkanningina hjá Gallup fyri Vinnuhúsið um viðurskiftini á føroyska arbeiðsmarknaðinum, hevur nakað av kegli verið um sjálva kanningina.

Forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag, Ingeborg Vinther, hevur skýrt tey svarandi fyri ikki at vita, hvat tey svaraðu. Serliga svarini til spurningin, um fólk ynsktu ein serliga rætt settan á stovn, til at taka sær av ósemjum, metti Ingeborg ikki verða álítandi. Hon vísti á, at høvdu fólk kent avleiðingarnar av einum arbeiðsrætti, høvdu ikki svarað, sum tey gjørdu. Til tann spurningin, svarar Ellindur Egilstrøð, at tað kann vera torført at taka støðu til ymiskar spuringar, og vita, hvussu ymiskt nýtt ferð at virka, men her er tað uppgávan hjá teimum avvarðandi at upplýsa fólki, so fólki kann taka støðu til ymisk samfelags mál, sigur Ellindur Egilstrøð

### Ein kanning um mánaðin

Gallup-Føroyar ger eina sokallaða Omnibus kanning hvønn mánað, har ringt verður til 500 tilvildarlig fólk yvir 15 ár um eitt hvørt evni. Omnibus er latín og merkir »fyri øll«, tvs., øll kunnu hava spurningar við í Omnibus kanningini, og hevur Vinnuhúsið nýtt møguleikan at vera við í juni Omnibus kanningini.

- Til trætuna, um hvørt Vinnuhúsið kann gera eina kanning um eina støðu, har felagið sjálvt er innblandað, hava vit onga støðu til. Eg haldi tó, at fólk mugu sleppa at siga sína hugsan um viðurskifti í samfelagnum, og tí meti eg tað ikki verða rætt í hesum førinum av Ingeborg, tá hon sigur, at Vinnuhúsið ikki skal gera kanningar ið eisini umfata teirra limir, greiðir Ellindur Egilstrøð frá.

### 500 er nóg mikið

Í Sosialinum mikudagin vístu vit á, at vanliga verður mett, at 1000 fólk skulu spyrjast, um spurnarkanningarnar skulu verða haldgóðar. Ingeborg Vinther hevur eisini verið í fjølmiðlunum og borið fram, at 500 fólk er ov lítið, men stjórin á Gallup-Føroyar vísir hesum aftur.

– Fólk frá Gallup í útlondum hava gjørt stikkprøvakanningar í Føroyum, og tær kanningarnar vórðu sera væl eydnaðar, og afturat hava vit haldgóð prógv fyri, at 500 fólk er nóg mikið, og tí kann eg ikki taka undir við kritikkinum hjá Ingeborg, sigur Ellindur Egilstrøð at enda.